# Takkarbøn úr betongi

***DEYÐSHÁÐ.** Meðan Marnar á Skúr, bygdarráðsformaður, lá í andarleypi á Ríkissjúkrahúsinum í Danmørk, legði hann sær eina við, at reistist hann aftur, skuldi tøkkin fara til verndareingil sín. Tøkkin var standmynd úr betongi*

Høgni Mohr

Bygdarráðsformaðurin í Nólsoy, Marnar á Skúr, er sjúkur. Seinastu tvey árini hevur hann drigist við herviliga livrasótt, ið er honum til miklan ampa.

Men kortini er Marnar takksamur. So takksamur, at hann er farin at stoypa sínar takkarkvøður, ið allar mynda verndareinglar, úr betongi.

### Ógrøðiligur livrabruni

Í 1998 gjørdist bygdarráðsformaðurin sjúkur umborð á nótaskipinum, Pelagos. Herðindini vóru so mikið ógvuslig, at hann noyddist at leggja seg upp á land. Eftir stuttari tíð fór hann á beinið. Staðfest varð, at hann hevði ógrøðiligan livrabruna. Á heystið sama árið herjaði brunin so hart, at hann mundi siglt av. Immunverjan legðist eftir livrini, og bygdarráðsformaðurin varð fluttur á Ríkissjúkrahúsið í Keypmannahavn.

– Eg var ongantíð ræddur, men eg fór at hugsa um lívið, ið eg helt hava verið gott, sigur Marnar á Skúr, ið væntaði, at deyðin var vísur.

– So upptærdur var eg, at tað gjørdi ikki mun um eg andaði ella prumpaði; dunsturin var øgiligur. Og eg taki onki aftur, tá ið eg sigi, at skarnið var hvítt, og landið sum kaffi, sigur bygdarráðsformaðurin, ið minnist, at hann luttók á einari læknaráðstevnu, har hann varð vístur fram í sínum skirvisliga hami.

– Eg bað teir vælsignaðar skera meg upp og brúka meg til eykalutir, um so var, at eg sigldi av, minnist Marnar.

### Tøkk til trúgva eingilin

Men Marnar hevði, og hevur framvegis, eina sterka Guðstrúgv. Á sóttarsong síni legði hann sær sjálvum eina við, at hóraði hann undan, skuldi okkurt minni verða latið úr hondum hansara: Ein tøkk til verndareingilin, ið Marnar er fullvísur í, hevur fylgt sær á lívsleiðini.

Marnar kom livandi og takksamur aftur til Nólsoyar. Og úrslitið gjørdist ein einglastandmynd úr betongi, ið hann sjálvur skýrir, Mariu Eide, tí einglaandlitini minna um andlitsdrøgini á navnframu lærarinnuni í Funningi, ið var ættað úr Nólsoy.

– Væl eru læknarnir góðir, men verndareingilin er nú bestur, sigur Marnar, ið síðan olmussuna er hildin fram við einglastoypingini í kjallaranum.

Listarliga stoypingin er náttarítriv. Tá ið friður er undir lonini, og andvekur ger um seg, fer bygdarráðsformaðurin, ið enn er nívdur av sjúkuni, niðurundir. Hesar løtur fær hann gagnnýtt sínar skapanargávur og grunda um Guðstrúnna samstundis.



*Olmussugáva Marnars á Skúr til verndareingil sín. Onkur nólsoyingur hevur mælt Marnari til at nýta standmyndina til gravstein, men um so verður, veit bygdarráðsformaðurin ikki at siga.*

**Mynd: Jens Kristian Vang**



*Marnar á Skúr, bygdarráðsformaður í Nólsoy. Á sjúkulegu lovaði hann, at vann hann seg upp á føtur aftur, skuldi tøkkin verða ognað verndareinglinum.*

**Mynd: Jens Kristian Vang**



*Stjórnarskifti í Noregi:*

# Grundarlag fyri nýggjum ES-orðaskifti verður nú lagt

*Thorbjørn Jagland verður í morgin norskur uttanríkisráðharri, og við hesum valinum leggur nýggja norska javnaðarstjórnin fyrsta part av grundarlagnum fyri einum tættari tilknýti til ES. Helst ynskja Stoltenberg og Jagland, at Noreg gerst limur í ES skjótast til ber*

Jógvan Hugo Gardar, Oslo

Eingin hevur enn váttað tað, men samstundis er tað eingin, sum hevur avsannað tað.

Um ikki nakað heilt serligt hendir, so gerst formaðurin í Arbeiðaraflokkinum, Thorbjørn Jagland, nýggjur norskur uttanríkisráðharri. Hetta merkir eina týðuliga broyting í norska uttanríkispolitikkinum.

Fráfarandi norski uttanríkisráðharri, Knut Vollebæk, er ein av best dámdu norsku uttanríkisráðharrunum nakrantíð. Í uttanríkisráðnum eru tey hørm um, at ein av teirra egnu fer frá. Knut Vollebæk er ein "superdiplomatur", ið nú skal aftur til virkna tænastu í uttanríkisráðnum — undir leiðslu av tí meir politiska Thorbjørn Jagland. Bert tíðin vil vísa, hvat fólk fara at siga um Jagland, men eingin ivi er um, at norskur uttanríkispolitikkur nú gerst meir politiskur.

Munurin millum Vollebæk og Jagland er tann diplomatiska tyngdin móti tí politisku tyngdini. Rammurnar fyri norskum uttanríkispolitikki eru rættiliga fastlagdar, og tað er ein breið semja í Stórtinginum um politikkin.

Stjórin fyri Nobel-stovninum, Geir Lundestad, segði í vikuni í eini samrøðu við Aftenposten:

»Ein uttanríkisráðharri sum fær hetta starv, tí hann hevur høga fakliga góðsku, kann, sum Vollebæk, gera eitt gott arbeiði sum 'superdiplomatur', innan givnar rammur. Ein tungur politikkari kann hava onnur mál, sum til dømis at broyta rammurnar.«

### Meir ES

Jens Stoltenberg hevur sum mál, at nýggja norska stjórnin skal vera meir »virkin í ES-politikkinum«.

Hetta er tað einasta, sum Jens Stoltenberg hevur sagt um, hvønn politikk nýggja stjórnin skal føra. Hetta er samstundis eitt týðuligt tekin um, at nýggja stjórnin meinar, at ES-limaskapur er best fyri Noreg.

Tað verður eingin nýggj umsókn um norskan ES-limaskap send fyri Stórtingsvalið í 2001, men eitt av málunum hjá parinum Stoltenberg/Jagland verður at fyrireika eina umsókn. Arbeiðaraflokkurin skal hava landsfund í heyst, og tá kann flokkurin fáa eina semju um, at nú er tíðin komin til at senda eina nýggja umsókn.

Thorbjørn Jagland hevur í røðum seinastu tíðina lagt dent á ein meir virknan og politiskan uttanríkispolitikk. Hann hevur týðuliga lagt herðslu á, at uttanríkismálaráðið eigur at virka fyri at hjálpa norskum útflutningi innan fíggjarfyritøkur, ídnað og serliga oljuvinnu.

Thorbjørn Jagland hevur í nógv ár verið ein av heitastu talsmonnunum fyri norskum ES-limaskapi. Fyri tíggju árum síðani skrivaði Jagland bókina »Min europeiske drøm«. Í hesi bók vísti hann millum annað til, at »arbeiðararørslan varð borin í heim í Europa. Her eru vit framvegis sterk«. Støðan er galdandi í dag, kanska enn meir enn fyri tíggju árum síðani. Sum floksleiðari hevur Thorbjørn Jagland eitt heilt annað europeiskt samstarvsnet enn tað, Bondevik-stjórnin hevði og hevði møguleika at brúka.

### Meir altjóða politikk

Í dag vera 12 av 15 ES-londum stýrd av sosialdemokratum og av flokkum, sum standa javnaðarrørsluni nær. Í einum heimi har globaliseringin av og á tykjast at ræða ein Thorbjørn Jagland, gerst ES tann skansin, sum kann bjarga tí vælferðarhugsan, sum vit hava havt í Norðanlondum í mong ár.

Thorbjørn Jagland hevur eisini víst altjóða samstarvinum stóran ans, og meinar at globaliseringin kann stýrast politisk. Um ein fylgir við í tí, Jagland hevur sagt tey seinnu árini, so er tann reyði tráðurin, at broytingarnar í heiminum eiga at stýrast politiskt. Hann meinar eisini, at Bondevik-stjórnin hevur verið merkt av »iva og mótstøðu«. Bondevik hevur ikki viljað tikið støðu til, hvønn leiklut Noreg skal spæla í altjóða politikki og virksemi. Millum annað meinar Jagland, at Noreg eigur at arbeiða meir innan felagsskapir sum WTO (heimsins handilsfelagsskap) og ST.

Sambært Jagland hevur Bondevik-stjórnin verið meir áhugað í at steingja Noreg úti frá altjóða samstarvi — í staðin fyri virkið at vera við í menningini av hesum.

### Hansara túrur

Tá Thorbjørn Jagland í morgin setir seg í sessin sum ovasti leiðari fyri uttanríkisráðnum, fær hann møguleikan at gera nakað við hugsanir sínar um altjóða stýring, broytingar av ST-felagsskapinum og nýggja tøkni. Nú skulu orðini og hugsaninar broytast til virknan politikk.

Í norska Dagbladet skrivar blaðmaðurin Halvard Helle, í eini viðmerking:

»Hann (Thorbjørn Jagland) hevur ikki ráð at byggja eitt globalt luftslott í leiivdunum av Tí Norska Húsinum«.

Tað Norska Húsið var grundarlagið undir Jaglandstjórnini, sum við fullari ferð fór í knús í 1997 og gav Bondevik møguleikan at sleppa framat…



*Thorbjørn Jagland tekur í dag helst við sum nýggju norskur uttanríkisráðharri*

**Mynd: Jógvan Hugo Gardar**

**fakta um**

## Thorbjørn Jagland

Føddur 5. november 1950 í Drammen
Giftur, tvey børn
Býr í Lier

**Bakgrund:**
Útbúgvin búskaparfrøðingur
Utredningssekretær i Arbeiderpartiet.
Konstituert partisekretær 1986-87.
Valdur floksskrivari frá 28. mars 1987 til 8. november 1992.
Formaður Arbeiðarafloksins frá 8. november 1992.
Forsætismálaráðharri frá 25. oktober 1996-17. oktober 1997.

**Nøkur fyrrverandi álitisstørv**
Limur í Buskerud fylkesting 1975-83.
Eygleiðari á aðalfundi ST'sheystið 1976.
Formaður í Arbeidernes ungdomsfylking (AUF) 1977-81.
Formaður í Det norske Arbeiderpartis (DNAs) internasjonale utvalg fra 1986.
Skrivari í floksins »nedrustningskomite« frá 1982.
Formaður í tingbólkinum hjá Arbeiðaraflokkinum í Stortinget frá 1993.
Parlamentarisk formaður frá 1993.

**Stórtingið:**
Umboðsmaður nr. 1 fyri Buskerud 1993-97, 1993-97:
Limur í Odelstinget.
Limur í Utenrikskomiteen. Medlem Den utvidede utenrikskomite. Medlem Valgkomiteen.
Medlem Nordisk Råd 1993-94.
Medlem Delegasjonen til en fellesparlamentarikerkomité mellom Stortinget og Europaparlamentet



*Fyrrverandi forkvinna Arbeiðarafloksins og forsætismálaráðharrin, Gro Harlem Brundtland og komandi forsætisráðharrin, Jens Stoltenberg*